# Teir ungu vunnu



*Jens Pauli Berg eigur vakrasta hagalambið í Hvalba. Tað fekk hannsteyp fyri á seyðasýning í Hvalba leygardagin*

**Ungdómurin er eisini farin a halda seg framat á seyðasýningunum í Hvalba og hesuferð vóru tað teir, sum fóru við steypunum**

SEYÐAHALD
*Áki Bertholdsen*

Jens Pauli Berg og brøðurnir Hilmar og Allan Sveinbjørnsson eiga vakrastu veðurlombini í Hvalba.

Tað fingu teir prógv uppá leygardagin.

Leygardagin var seyðasýning í Hvalba, har veðurlomb vórðu sýnað.

Tað eru nú átta ár síðani, at Hvalbingar fóru undir at sýna seyð og undirtøkan var aftur góð hesuferð.

Lombini vórðu býtt sundur í tveir bólkar, hagalomb fyri seg og traðarlomb fyri seg. Tilsamans vóru 83 lomb við á sýningini, 68 hagalomb og 15 traðarlomb. Hetta var fyrstu ferð, at teir royndu hetta sundurbýtið.
Umstøðurnar at sýna seyð í vóru av teimum bestu, tí lombini vórðu skoðað inni í sjálvari Roynhøllini, har steypini eisini vórðu handað.

Eftir at hava mett um øll lombini, komu dómararnir til tað úrslit, at av teimum 83 lombunum fingu 26 1. virðisløn, tvs, at tey høvdu ongi brek.

Tilsamans vóru bara fýra lomb, sum høvdu so nógv brek, at tey onga virðisløn fingu, annars fingu øll hini 53 lombini 2.ella 3. virðisløn, tvs, at tey vóru góð, men høvdu kortini onkur brek.

Dómarnir á sýningini vóru, aftur hesuferð Petur Karl av Rana, Óli í Hjøllum, Frits Poulsen og Ásmund Bærendsen.

Annars fullu virðislønirnar fyri hagalombini soleiðis, at tað vakrasta av teimum átti Jens Pauli Berg, tað næstvakrasta átti Dánjal Olsen og tað triðvakrasta átti Hanna Willumsen.

Vakrasta traðarlambið áttu brøðurnir Allan og Hilmar Sveinbjørnsson, næstvakrasta átti Hartvig Hammer og triðvakrasta, Eliesar Poulsen.

Allir hesir seks eigararnir fingu steyp til ognar.

Men harumframt varð eitt ferðasteyp latið til tað lambið, sum var vakrast av øllum og har mettu dómarnir, at Allan og Hilmar Sveinbjørnsson skuldi hava, tí teir meintu, at tað hevði munin á tí hjá Jens Paula Berg.

Sýningin í Hvalba leygardagin var tann seinasta bygdarsýningin í Suðuroynni heyst. Men seinni, helst leygardagin 24. november, er ætlanin at hava eina oyggjarfinalu, har tey, sum hava vunnið á sýningunum í teimum ymsu bygdunum, verða við. Tann sýningin verður eisini í Hvalba.



*Vakrasta traðarlambið í Hvalba eiga brøðurnir Hilmar, tv við tí stóra ferðasteypinum og Allan Sveinbjørnsson, við ognarsteypinum. Á seyðasýningini í Hvalba leygardagin var teirra lamb eisini mett at vera tað vakrasta av øllum*

# Sumbingar fáa nú nýtt ráðhús

**Ætlanin er at umsitingin hjá Sumbiar Kommunu skal flyta í nýtt hús næsta ár**

SUMBA
*Áki Bertholdsen*

Næsta ár fáa sumbingar nýtt ráðhús.

Í fjør keypti Sumbiar Kommuna Fiskahúsið á Mølini fyri góðar 300.000 krónur og ætlanin er, at umsitingin hjá Kommununi skal flyta í húsið næsta ár.

Síðani kommunan keypti húsið, hevur hon arbeitt við at útvega uppskot um, hvussu tey kunnu innrættast til ráðhús.

Og tá ið bygdaráðsfundur var seinast, varð eitt uppskot, sum Landsbyggifelagið hevði gjørt, lagt fyri bygdaráðslimir.

Eftir tí verður helvtin av húsinum goymslurúm, sum ikki skal innrættast,men hin helvtin verður innrætta við fundarhøli, tveimum skrivstovum, skjalagoymslu og wc.

Men harumframt hevur Landsbyggifelagið skotið upp at gera ein útbygning oman ímóti sjónum, har er ætlanin, at undirhús skal vera, har sumbingar kunnu hittast í fríløtum, eins og vit kenna tað frá øðrum undirhúsum kring ymsastaðni í landinum.

Í uppskotinum, sum er gjørt til fíggjarlógfyri 2002, eru 300.000 krónur settar av til at innrætta húsið fyri.

Men Jacob Vestergaard, borgarstjóri, ivast í, um tað er nóg mikið, so má restin útvegast onkusvegna.

Húsið, sum kommunan skal flyta í, er 200 fermetrar til støddar. Borgarstjórin sigur, at tað kann tykjast nakað stórt til kommununa. Men hann vísir á, at talan er um at leggja fleiri og fleiri tænastur út til kommunurnar at umsita og tá ið kommunan fer undir eitt hús, er tað betri at leggja upp fyri, so at tað eisini nøktar tørvin framyvir.

Hann sigur, at verða fleiri øki løgd út til kommunurnar at umsita, er hann sannførdur um, at eisini Sumbiar Kommuna er før fyri at umsita tey øki, sum kommunurnar eftir ætlan, skulu umsita.

Sum er húsast kommunan í eini lítlari skrivstovu í skúlanum men tað liggur eisini í málinum, at skúlin hevur brúk fyri hølunum og tað er eisini ein orsøk til at kommunan ætlar at flyta.



*Soleiðis hevur Landsbyggifelagið hugsa sær, at Fiskahúsið á Mølini, sum kommunan hevur keypt, fer at síggja út. Útbygningurin er omaneftir ímóti sonum og eftir ætlanini skal undirhús verða í honum til sumbingar at hittast í í fríløtunum*



# Sjónvarpið í nýggjum hami

**Samstundis sum nýggja studiið hjá Sjónvarpi Føroya verður tikið í nýtslu, fer SvF at senda Dag og Viku fýra ferðir um vikuna. Fyrsta vikan verður nógv merkt av politisku støðuni upp undir fólkatingsvalið**

SJÓNVARP
*Edvard Joensen*

Sjónvarp Føroya sendir nú Dag og Viku fýra ferðir um vikuna. Fyrsta vikan, Sjónvarp Føroya sendir tíðindi úr nýggjum hølum, verður rættiliga nógv merkt av politikki.

Sjónvarp Føroya byrjaði í gjárkvøldið at senda Dag og Viku mánakvøld. Við hesum verða fýra sendingar um vikuna. Hinar tríggjar fara at liggja tær vanligu tíðirnar, týskvøld, hóskvøld og fríggjakvøld klokkan 20.00, sigur Øssur Winthereig, tíðindastjóri í Sjónvarpi Føroya.

Tað er Tine Rygum, sum er donsk, ið hevur skapt nýggja studiið hjá Sjónvarpi Føroya. Hon hevur millum annað eisini gjørt pallmyndirnar til donsku undirhaldssendingarnar "Den store klassefest" og "Venner for livet" hjá TV2, sum eisini verða vístar í SvF.

### Dagur og Vika

Nýggja studiið hjá Sjónvarpi Føroya fer fyrst og fremst at verða nýtt til Dag og Viku, umframt tær kjaksendingar, sum vanliga plaga at verða sendar úr D&V studiinum.

Dagur og Vika fara at verða send fýra ferður um vikuna, mánakvøld, týskvøld, hóskvøld og fríggjakvøld klokkan 20.00, og verður hvør sendingin umleið 20 minuttir.

Mikukvøld verður sendingin "" send klokkan 20.00, og beint eftir hana kemur sendingin "Grannar okkara" sum ein sjálvstøðug sending.

Aðrar ískoytissendingar verða eisini fluttar. Eitt nú verður "Breddin" fluttur til mánakvøld, og "Globus" verður send týskvøld, sigur Øssur Winthereig.

### Politikkurin

Sum vera man verður hendan fyrsta tíðindavikan í nýggja studiinum nógv merkt av, at fólkatingsval er um eina viku.

Fimm politiskar kjaksendingar verða sendar beinleiðsi úr nýggja studiinum. Tann fyrsta var í gjár, og vóru luttakaranir har Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin. Katrin Petersen var vertur. Hon og Øssur Winthereig fara at býta hesar kjaksendingarnar sínámilum.

Øssur Winthereigh sigur, at sendingarnar eru skipaðar soleiðis, at tveir flokkar verða settir upp móti hvør øðrum. Býtið er ikki gjørt við lutaskasti, sum annars ofta plagar at vera vanligt, uttan at Sjónvarpið sjálvt hevur sett flokarnar saman.

Fyrsta sendingin, sum var í gjár, var millum teir flokkaranar, sum í løtuni hava sess á Fólkatingi, Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin.

Í kvøld verða luttakararnir Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, sum verða roknaðir sum teir báðir mótpolarnir í føroyskum politikki, tá hugsað verður um støðuna mótvegis Danmark, sigur tíðindastjórin í Sjónvarpi Føroya.

Í annaðkvøld verða tað Miðflokurin og Fólkaflokkurin, sum fara at kjakast, meðan Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin eiga tørn hóskvøldið. Seinasta kjaksendingin upp undir fólkatingsvalið verður fríggjakvøldið millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin.

– Býtið er gjørt soleiðis, sigur Øssur Winthereig, at teir fýra stóru flokkarnir sleppa tvær ferðir í part í studiið, meðan teir báðir smáu bara sleppa einaferð hvør.

Eisini mánakvøldið verður sent í samband við fólkatingsvalið. Tá verður samsending um fylgisvein við danskt sjónvarp, sigur Øssur Winthereig.

So er tað týskvøldið í næstu viku, sum er sjálvt valkvøldið. Tá verður sent úr stóra studiinum í Sjónvarpinum, eins og samband verður við ymisk valstøð í Føroyum og við Christiansborg.

Katrin Petersen fer at vera studiivertur í SvF, har føroyskir politikarar fara at hittast, meðan Øssur Winthereig fer at taka sær av sambandinum við valstøðini og Christiansborg, har Brynhild Thomsen fer at vera stødd.

Sum eitt ískoyti til politiksu sendingarnar í Sjónvarpi Føroya nevnir Øssur Winthereig, at "Rangt og Rætt", sum skuldi verið send leygarkvøldið, verður flutt til hóskvøldið í komandi viku. Sostatt verða tvær sendignar við "Rangt og Rætt" í komandi viku.

Orsøkin er, at í sendingini, sum longu er fest á band, luttaka báðir teir núverandi fólkatingsmenninir, Jóannes Eidesgaard og Óli Breckmann. Tí verður hildið óheppið at vísa sendingina nú, og verður tí bíðað, til valið er av, sigur Øssur Winthereig, tíðindastjóri í SvF.



*Katrin Petersen og Øssur Winthereig í nýinnrættaðu sjónvarpshølunum. Nýggja studiið líkist teimum, sum eru at síggja í sendingum hjá stóru, útlendsku sjónvarpsstøðunum við livandi myndum á vegginum aftan fyri vertin*

# Sámal Petur á brúnni

**Á eykaaðalfundi hjá Sjálvstýrisflokkinum, sum varð hildin í Klaksvík leygardagin, varð Sámal Petur í Grund valdur til politiskan formann í flokkinum**

FORMANSVAL
*Edvard Joensen*

Tað tók eina viku hjá Sjálvstýrisflokkinum at fáa valt Sámal Petur í Grund til formann. Men leygardagin varð formanssessur hansara endaliga staðfestur á eykaaðalfundi í Klaskvík.

Eykaaðalfundurin valdi samstundis Eyðun Elttør, landsstýrinmann, til næstforman.

Landsnevndarval var eisini, og varð landsnevndin afturvald við tí undantaki, at veteranurin í Klaksvík, Schuman Hansen, valdi at bíta um sess við tiltakslimin Jan Joensen. Schumann Hansen er nú tiltakslimur. Eisini Edvard Hermansen, landsnevndarformaður, tók við afturvali. Nýggja landsnevndin hevur tó ikki skipað seg enn.

Eykaaðalfundurin valdi eisini tveir limir í starvsnevndina. Tey eru Petur Oliver í Hoyvík, umboðandi Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, og Ása Olsen, sum umboðar Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag.

Sámal Petur í Grund, formaður, sigur, at fundurin var væl mannaður. Tvey umboð møttu ikki vegna forfall, sigur hann. Fundurin gekk væl, og øll mál vórðu virðiliga avgreidd, sigur nýggi politiski formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum.

*Sámal Petur í Grund hevur eftirlit við sjálvstýraranum*
*Mynd: Jan Müller*

